Lexus LF-A konseptbilur:

# Super sportsbilur frá Lexus

**Í 2007 kemur super sportsbilurin Lexus LF-A eftir ætlan á marknaðin. Talan verður um ein rættuligan sportsbil við 5,0 litur V8 motori við umleið 500 hk. Toppferðin verður um 300 km/t**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Vit hava nú í eina tíð sæð spiónmyndir av einum bili, sum skuldi vera tann nýggi Toyota Supra, men nú vísir tað seg, at talan er um super sportsbilin Lexus LF-A, sum enn er ein konseptbilur. Bilurin hevur verið royndarkoyrdur á Nürnberg-ringinum í Týsklandi og í USA.



*Lexus LF-A verður ein rættuligur sportsbilur við umleið 500 hk og eini toppferð uppá um 300 km/t*

Motorurin verður ein 5,0 litur V8 við umleið 500 hk og automatiskum 7-trins girkassa. Toppferðin verður um 300 km/t. So her er talan um ein rættuligan sportsbil.

Lexus LF-A kemur eftir ætlan á marknaðin í 2007.

# Svartir kassar minka um ferðsluóhappini

**Eins og í flogførum eru "svartir kassar" nú eisini at finna í bussum og í øðrum flutningsakførum. Royndirnar vísa, at bilførarnir, sum koyra við hesum boksum ísettum, ansa betur eftir og talið á ferðsluóhappum verður munandi lægri**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hósdagin 24. februar 2005 almannakunngjørdi danska ferðslumálaráði úrslitini av eini roynd við 50 bussum hjá bussfyritøkuni AC-trafic (ACT), sum hava koyrt við "svørtum kassum" í eitt longri tíðarskeið.

Endamálið, við royndunum við "svørtu kassunum", var at tryggja týðandi upplýsingar um koyringina hjá bussførarunum t.d áðrenn eitt ferðsluóhapp.

Úrslitið av hesum royndum vísa, at bilførarar, sum koyra við hesum boksum ísettum, ansa betur eftir, og talið á ferðsluóhappum verður munandi lægri.

Í Íslandi eru eisini gjørdar líknandi royndir við "svørtum kassum" í postbilum, og har hava teir staðfest eina lækking í ferðsluóhappum upp á 56 prosent.

Frágreiðingin hjá danska ferðslumálaráðnum staðfestir, at tað er av stórum týdningi at gera eftirmetingar, av tí sum verður dokumenterað við "svørtu kassunum", saman við bilførarunum, um boksirnar skulu hava fyribyrgjandi ávirkan í ferðsluni.

"Svørtu kassarnir" hava nú verið í brúk í longri tíð, og tað sær út til, at bussførararnir hjá ACT hava góðtikið, at teir eru í bussunum, og føla teir seg tryggar við tí.

Upplýsningar, sum eru at finna í "svørta kassanum", eru t.d. hvat ferðin var, um bussførarin bremsaði áðrenn óhappið hendi, hvussu ljósføringin var. Alt verður skrásett.

Tað verður kanska ikki leingi, til hendan útgerð eisini verður at síggja í persónbilum, fyrst sum eykaútgerð og seinni sum standard.



*Svartir kassar minka um ferðsluóhappini*




**MAZDA6 2,0 HATCHBACK 140 HK**
Árg 2005, Km 1.000. Bilurin er væl útgjørdur við t.d. leðursetrum, sóltaki, fartpiloti, hita í setrunum og aircondition. Nýprísur kr. 284.500. Kr. 225.000.
**Tlf. 222075**





**HONDA CIVIC 1.6I V-TEC**
Árg 2002, Km 15000. Kr. 125000. Til sølu fyri kunda



**CITROEN BERLINGO 1.6I MULTISPACE**
Árg 2002, Km 27000. Kr. 125000. Til sølu fyri kunda



**CITROEN BERLINGO 1.6I MULTI CLIM V¨RUB.**
Árg 2003, Km 10000. Kr. 115000. Til sølu fyri kunda



**CITROEN JUMPY 1.9TDI V¨RUB.**
Árg 2000, Km 60000. Kr. 105000. Til sølu fyri kunda



**CITROEN BERLINGO 2.0HDI CITYVAN**
Árg 2003, Km 30000. Kr. 125000. Til sølu fyri kunda



**VOLVO S70 2.0I 4H**
Árg 1999, Km 49000. Kr. 169000



**SKODA FABIA 1.4I 5H**
Árg 2000, Km 60500. Kr. 75000



**SAAB 9-3 2.0I 5H**
Árg 1999, Km 73000. Kr. 140000



**MITSUBISHI CARISMA 1.9TD 4H**
Árg 1998, Km 85000. Kr. 90000



**CITROEN ZX 1.9TD 5H**
Árg 1996, Km 139000. Kr. 35000



ML464
**CITROEN XANTIA 1.9TD STC**
Árg 1996, Km 166000.Kr. 65000



**CITROEN XANTIA 1.9TD STC**
Árg 1998, Km 130000. Kr. 108000



**CITROEN XSARA 1.6I 5H**
Árg 1998, Km 69000. Kr. 95000



**CITROEN ZX 1.9D STC.**
Árg 1996, Km 178000. Kr. 58000



**MERCEDES BENZ VITO 110D V¨RUB.**
Árg 1998, Km 58000. Kr. 105000. Prísurin er v/mvg. Í sera góðu standi! Sýnaður februar 2005



**PEUGEOT 306 2.0GTI 170HK**
Árg 2000, Km 70000. Kr. 140000



**CITROEN XANTIA 2.0HDI STC.**
Árg 1999, Km 119000. Kr. 110000. Bilurin sær sera væl út



**PEUGEOT 306 1.6I STC.**
Árg 1998, Km 78000. Kr. 69000



**MERCEDES BENZ C180 ELEGANCE 122HK**
Árg 1995, Km 194000. Kr. 169000. Leður setur, klima anlegg v.m.



**CITROEN XANTIA 1.9TD 5H**
Árg 1999, Km 125000. Kr. 110000

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
**Ivan Johansen Bilar**
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo


## Gott ár hjá Seat



2004 var eitt gott ár hjá sponsku Seat bilverksmiðjuni. Umsetningurin vaks við 6,1 prosentum til 43,7 milliardir krónur, og yvirskotið vaks við 7,8 prosentum. Framleiddir vórðu tilsamans 458.460 Seat bilar í fjør

*Kelda: Motor Magasinet*

## Cadillac framleiðast Svøríki



General Motors, sum eiga Saab bilverksmiðjuna, hava ætlanir um framleiðslu av Cadillac á Saab verksmiðjuni í Trollättan, sigur GM stjórin Fritz Hendersen við danska blaðið Børsen

*Kelda: Motor Magasinet*

## Skoda Superb best



Týski bilfelagsskapurin ADAC, sum árliga kannar kvalitetin á bilum, og hvussu nøgdir kundarnir eru við sínar bilar, gav Skoda Superb besta karakter í sínum klassa

*Kelda: Motor Magasinet*